# Atlantsflog keypir nýtt flogfar



*RJ 100 flogførini frá British Aerospace líkjast BAe 146, sum Atlantsflog hevur, men tað hevur størri motormegi og tekur 94 ferðafólk*

**Mikudagin skrivaði Atlantsflog undir fyribils sáttmála við sveisiska felagið Swiss um at keypa eitt flogfar, sum skal latast føroyska felagnum í heyst. Talan er um eitt British Aerospace RJ 100 flogfar frá 1999, sum tekur 94 fólk**

FLOGFERÐSLA

Flogfarið er seks ára gamalt og av slagnum RJ 100, sum British Aerospace bygdi í 1999. RJ flogførini eru nýggjara útgávan av BAe 146 flogførunum, sum felagið frammanundan eigur.

Hetta flogfarið líkist júst hinum flogførunum, men er útgjørt við nýggjari tøkni og motorarnir hava størri megi. RJ 100 flogfarið tekur 94 ferðafólk ella 10 ferðafólk fleiri enn BAe 146 flogførini.

Ætlanin er at taka nýggja flogfarið í nýtslu, tá vetrarferðaætlanin tekur við síðst í oktober. Eitt av teimum fýra flogførunum, sum Atlantic Airways hevur í dag, er leigað frá British Aerospace, men støða er ikki tikin til hvørt hetta flogfarið skal latast aftur ella ikki, tá nýggja flogfarið kemur.

- Tað veldst um tørvin, sigur Atlantsflog.

**el**

# Nýtt Toyota-hús í Klaksvík



*Teir eru nú farnir at stoypa fundametnið til nýggja bygningin hjá Reyni Service í Klaksvík*

**Eftir at hava húsast í leigaðum hølum í skjótt 20 ár, flytur Reyni Service í nýggjan sølu- og verkstaðsbygning í Klaksvík í oktober**

BILASØLA
*Eirikur Lindenskov*

Bygningurin verður umleið 650 fermetrar til støddar við allari nútímans útgerð, ið skal til fyri at nøkta øll ynski, ið ein framkomin bilasølu- og tænastuverkstaður eigur at hava í dag.

- Grundøkið er umleið 2.300 fermetrar til støddar, so her skuldi verið munandi betri hjá viðskiftafólki at komið framat í mun til verðandi umstøður, sigur Árni Rasmussen, stjóri hjá Reyni Service.

Tað er ikki greitt enn, hvussu nógv fólk fara at starvast í nýggju hølunum, men roknað verður í fyrsta umfarið við fýra til seks fólkum.

- Vit síggja fram til at kunna veita eina enn betri tænastu við nýggju umstøðunum og bjóða bæði norðingum og teimum hinumegin tunnilin vælkomnum, sigur Árni Rasmussen.




## SMS søkir fíggjarstjóra

**Ættarliðsskifti skal vera í eini av Føroya størstu fyritøkum, samstundis sum virksemið verður økt, SMS verður umbygt og leiðslan styrkt**

**Sunn og sterk fyritøka**
P/F SMS er ein sunn og sterk fyritøka við ein-um eginpeningi uppá góðar 100 mió. kr. Ein føroyskur og ein íslendskur partaeigari eiga 50% hvør.

Høvuðsendamálið hjá P/F SMS er at eiga og reka handlar kring landið, og at standa fyri øllum leigumálunum í Sølumiðstøðini SMS.

Í løtuni eigur fyritøkan hesar níggju handlar: Miklagarð, Hornið, Benetton, Mylnuna, Brotið í Saltangará, og Bónushandlarnar í Havn, í Klaksvík, á Glyvrum og á Tvøroyri. Harumframt eigur fyritøkan matstøðini í SMS, BurgerKing, SunSet og Perluna.

Tilsamans 325 eru í starvi, og handlarnir seldu í fjør fyri 260 mió. kr. uttan MVG.

**Víðkað og vaksandi virksemi**
Eitt annað endamál hjá fyritøkuni er at gera íløgur í virðisbrøv. Vit eru ein av høvuðspartaeigarunum í P/F Fastogn, ið varð stovnað fyri góðum ári síðani. SMS bygningurin er ein av seks bygningum, sum felagið eigur.

Tey seinastu árini hava vit nýtt nógva orku til at vaksa um okkara virksemi, og hesin vøkstur heldur fram. Vit fara um stutta tíð at eiga fleiri handlar, eins og nýggj sølumiðstøð skal standa liðug í 2006.

**Nýggj og sterkari leiðsla**
Tað standa sostatt fleiri stórar avbjóðingar fyri framman. Tí skal leiðslan eisini umskipast og styrkjast. Felagið skal hava eina trímanna stjórn við einum forstjóra, einum fíggjarstjóra og einum býlingastjóra.

Hvør limur í stjórnini fer at hava beinleiðis ábyrgd mótvegis nevndini.

**Nýggjur fíggjarstjóri**
Tað er í hesum sambandi, at vit nú søkja eftir einum fíggjarstjóra — kvinnu ella manni.

Talan er um eitt týðandi og krevjandi starv. Í høvuðsheitum skal fíggjarstjórin standa á odda fyri framtíðar fíggjardeild okkara, har hon/hann skal hava beinleiðis leiðslu av starvsfólkunum og ábyrgdina av øllum tættum innan fíggjarstýring. Harumframt skal hon/hann vera ein natúrligur partur av stjórnini og taka lut á nevndarfundum.

Fíggjarstjórin skal syrgja fyri at alt virkar, og hava evnini at taka neyðug stig, tá tað ikki virkar.

**Vit bíða eftir tí rætta**
Umsøkjarar skulu hava hægri ástøðiliga útbúgving og viðkomandi hollar praktiskar royndir.

Lønin er góð og í samsvari við krøv og ábyrgd. Eftirlønarskipan verður boðin. Er tørvur á tí, kunnu vit eisini hjálpa við at útvega bústað.

Vit vilja hava samband við rætta viðkomandi skjótast gjørligt, men eru til reiðar at bíða við at seta starvið, um tað er neyðugt.

Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og skulu — saman við skjalprógvum — sendast til:

P/F SMS
Att. Hans Mortensen, stjóri
Postboks 1059
110 Tórshavn

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Hans Mortensen á tlf. 31 30 41. Tað ber eisini til í trúnaði at spyrja seg fyri hjá grannskoðara okkara, Árna Ellefsen, grannskoðaravirkið Spekt, tlf. +298 34 34 34

SMS

SMS P/f, á Trapputrøðni, 110 Tórshavn, tel. +298 31 30 41, fax +298 31 74 34, heimasíða: sms.fo